## Spenningur í Bretlandi

Spenningurin á tí politiska pallinum í Bretlandi økist í hvørjum, so hvørt sum tað styttist til parlamentsvalið. Fyri stuttum góvu meiningakanningar konservativa andstøðuflokkinum greiðan meiriluta, men nú vísa kanningar, at stjórnarflokkurin hjá Gordon Brown fær flest umboð í Parlamentið á valinum. Sambært blaðnum The Daily Telegraph gevur kanningin konservativa flokkinum 37 prosent og Labour 32, men vallógin ger, at Labour kortini fær fleiri umboð í Parlamentið.



## Ríkmaður svikari

Í Italia hevur løgreglan handtikið ríkmannin Silvio Scaglia, tí løgreglan hevur illgruna um, at hann hevur verið ein av høvuðspersónunum í einum stórum máli um svik. Scaglia bleiv tikin á flogvøllinum í Rom, júst sum hann var komin hagar í sínum privatflogfari. Frammanundan hevur løgreglan tikið 56 fólk í sambandi við tað sama málið. Ákæruvaldið sigur, at talan er um svik fyri meiri enn tvær milliardir evrur ella næstan 15 milliardir krónur.

# Fuglfirðingar stinga høvdini saman

**Í gjárkvøldið var almennur býráðsfundur í Fuglafjarðar kommunu, og eftir býráðsfundin var framløga fyri býráðslimunum av eini verkætlan, sum ætlanin er at reisa á føtur í Fuglafirði**

FUGLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Sum skilst, er tað á hesum økinum millum Havsbrún og bygningin hjá Bergfrost í Fuglafirði, at ætlanir eru frammi um at byggja eitt framkomið pelagiskt virki*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hevur havt frænir av, at fuglfirðingar eru farnir at stinga høvdini saman um, hvussu skipast kann fyri, at fóðurvirkið Havsbrún kann fáa meiri av rávøru til sína framleiðslu.

Fóðurframleiðslan hjá virkinum í Fuglafirði er grundarlagið undir einari gevandi føroyskari alivinnu, ið stendur fyri týðandi parti av føroyska útflutningsvirðinum.

Rávørunøgdin hjá Havsbrún er raslaði niður seinastu árini og virkið, sum áður kundi keypa eini 300.000 tons av rávøru um árið, fekk í fjør bert ein stóran triðing av hesi nøgd.

### Landingarskylda

Í eina tíð hava fuglfirðingar og ivaleyst aðrir við arbeitt við ætlanunum um, hvussu grundarlag kann skapast fyri einum pelagiskum virki í Fuglafirði, har hesi fiskasløg verða meirvirkað, og at Havsbrún síðan keypir fráfallið til sína framleiðslu.

Í fjølmiðlunum hevur eisini verið frammi, at minni enn 20% av pelagiska tilfeinginum, sum Føroyar eiga, kom upp á land í Føroyum í fjør.

Øll hini 80% vórðu seld uttanlands.

Politiskt hevur seinastu tíðina eisini verið róð fram undir møguliga at seta landingarskyldu í Føroyum á ein part av tí pelagiska tilfeingi, sum vit hava møguleika at fiska.

Herfyri segði sjálvur løgmaður, at hann kundi hugsað sær, at 1/3 av hesum tilfeingi kom upp á land í Føroyum beinanvegin, og at nøgdin síðan stigvíst veksur yvir eitt 5-áraskeið.

### Virkisætlan

Í løtuni fæst einki ítøkilig at vita um framløgufundin í Fuglafirði gjárkvøldið.

Sosialurin var í Fuglafirði í gjárkvøldið og lúrdi uppá, at okkurt ítøkiligt møguliga var at rætta.

Borgarstjórin, Sigurd Simonsen, váttar, at framløgufundur var í gjárkvøldið, men samtykt varð samstundis, at einki skal sigast alment, fyrr enn vinnan í økinum er kunnað nærri um ætlaninar.

Sosialurin hevur skilt, at ætlanin er at byggja eitt nútímans pelagiskt virki millum Havsbrún og bygningin hjá Bergfrost.

Vit fara at venda aftur til málið, tá borgarstjórin helst í komandi viku vil lata okkum vita meiri ítøkiligt um, hvussu henda forvitnisliga verkætlan sær út.

# Jóhan Dahl á kunningarfundi í Fuglafirði

**Fuglfirðingar hava stórar ætlanir við teimum útbyggingum, sum gjørdar eru framvið sjósíðuni. Býráðið ætlar, at Fuglafjørður skal verða ein tænastu-og tilfeingisdepil hjá okkara sjóvinnu**

FUGLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

At fuglfirðingar hava hjarta fyri sjóvinnu, sæst skjótt, tá hugt verður eftir, hvussu havnalagið og havnaøkið er útbygt gjøgnum fleiri ár.

Fuglafjarðar havn hevur havt vøkstur í skipatalinum, sum vitja á Fuglafirði, og hesin vøkstur stendst ikki minst av, at stór skip nú kunnu bunkra tungolju á Fuglafirði.

Rættiliga nógv virksemi er fram við havnalagnum í Fuglafirði ein vanligan dag og gjøgnum eina viku.

Stór skip bunkra tungolju, útlendskir trolarar umskipa veiði, skip leggja frystigóðs upp til Bergfrost, skip taka nótir umborð, og útlendsk skip landa til Havsbrún.

Soleiðis kann ein dagur ganga á havnalagnum í Fuglafirði.

### Jóhan á vitjan

Fyri eini tíð síðan bjóðaði Fuglafjarðar býráð landsstýrismanninum í vinnumálum, Jóhan Dahl, til Fuglafjarðar at hoyra, hvat býráðið hugsar sær í framtíðini.

Jóhan Dahl sigur, at býráðið á hesum fundi læt hann vita, at Fugafjørður ynskir at gerast ein tænastu- og tilfeingisdepil.

- Hetta var ein fundur, har eg á breiðum grundarlagi fekk at vita, hvørjar ætlanir Fuglafjarðar kommuna hevur á hesum øki. Á fundinum fekk eg eisini kunnleika um tær ætlanir, sum eru frammi um eitt nýtt pelagiskt virki í Fuglafirði, sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum.

At framløga var í Fuglafirði í gjár um virkisætlanir á pelagiska økinum, og at býráðið fyri nøkrum vikum síðan kunnaði landsstýrismannin í vinnumálum um Fuglafjørð sum tilfeingisdepil, bendir á, at hetta eru ætlanir, sum meiri fer at hoyrast um í tíðini, sum kemur.